STUTT SAGT

## Rigga til útbyggingina

**Klaksvík:** Tað hevur leingi verið eitt ynski, og nú sær umsíðir út til at skúlin við Ósánna verður útbygdur.

Á fundi í býráðnum stutt undan jólum í fjør varð henda útbyggingin samtykt, og nú er klárt at fara í holt við hana.

Upplýst verður, at spakin verður sett í jørðina longu í summar til arbeiðið at gera lendið klárt til útbyggingina.

Henda útbyggingin skal gerast norður úr verandi skúlabygningi, og byrjar fyrst í komandi ári.

**sb.**

## Egið skótahús

**Runavík:** Skótaliðið hjá KFUM-skótunum á Glyvrum telist millum størstu skótabólkar í landinum. Í bólkinum eru um 100 limir, sum koma úr øllum bygdum við Skálafjørðin.

Nú hava skótarnir sett sær eitt mál fyri, nevniliga at útvega sær egið skótahús í Runavík. Í samband við hetta hevði býráðið eitt mál um hetta fyri á seinasta fundi sínum.

Her var eitt mál, har Ognarhagin á Mýrunum søktu um at frábýta eitt grundstykki burtur av eini trøð nærhendis Toftavatni til KFUM-skótarnar at byggja skótahús á.

Á fundinum hevði Byggi- og býarskipanarnevndin játtað hesum frábýtinum, og á fundi 1. juni samtykti býráðið at taka undir við tilmælinum frá Byggi- og býarskipanarnevndini.

Býráðsfundurin viðgjørdi eisini eitt annað mál í hesum sambandi, nevniliga viðvíkjandi barnaansingini og hesi ætlanini hjá skótunum at byggja egið skótahús.

Sosiala nevnd mælir til at arbeiða víðari við ætlanini. Og tað samtykti býráðið eisini.

**sb.**

## Øki til ídnaðin

**Toftir:** Sáttmáli er nú undirskrivaður um arbeiðið at gera eitt øki millum Oyrarnar og Rætt byggibúgvið.

Ætlanin er, at hetta ídnaðarøkið skal vera klárt at byggja á í september mánaði.

Tað er Hentze Entreprenørar sum skal standa fyri arbeiðinum, sum longu er farið í gongd. Teir gera arbeiðið fyri slakar 1,6 mió. kr.

**sb.**

# Føroysk hjálp kemur væl við í Indonesien

**Tríggjar vikur eftir herviliga jarðskjálvtan í Indonesien er framvegis stórur tørvur á neyðhjálp. - Størsta avbjóðing beint nú er at fáa tey heimleysu undir tak og fáa heilivág, læknahjálp og slíkt til harðast raktu økini, sigur altjóða stjórin hjá Reyða Krossi í Danmark, Anders Ladekarl**

NEYÐHJÁLP

*Snorri Brend*

*snorri@sosialurin.fo*

**Indonesien:** – Tørvur er á enn størri neyðhjálp, sigur Suni Vinther, formaður í føroysku deildini av Reyða Krossi.

Tey í felagsskapinum hava fylgt væl við gongdini eftir jarðskjálvtan fyri sløkum trimum vikum síðani, sum legði eitt stórt øki oyðið.

Frá føroyskari síðu hevur ein higartil sent 50.000 kr. til arbeiðið eftir jarðskjálvtan, men ein ynskir framvegis at stuðla við enn meiri pening.

– Á fundi fyrr í vikuni avgjørdu vit tí at játta 100.000 kr. aftrat til Indonesien.

– Saman við tí, sum landsstýrið hevur sent, hava føroyingar higartil sent 250.000 kr., sigur Suni.

Hetta er so tað sum Reyði Krossur sjálvur hevur sent. Tann vanligi føroyingur hevur eisini verið íðin at stuðla.

Ein innsavning umvegis giro og peningastovnarnar hevur higartil givið 30.000 kr., umframt tað sum fólk hava latið við at ringja til tlf. 905656.

### Hjálpin ger mun

Lítil ivi er um, at hesin føroyski peningurin kemur væl við í arbeiðinum at fáa lívskorini hjá fólkinum í Indonesien aftur á eitt rímiligt støði.

Slíkt kostar sjálvandi hópin av peningi, og enn vantar nógv í. Altjóða Reyði Krossur hevur tí heitt á heimssamfelagið um at játta 120 mió. aftrat sum hjálp til teirra, sum yvirlivdu jarðskjálvtan.

– Umframt ta peningaligu hjálpina er eisini neyðugt at veita sálarligan stuðul og at hjálpa fólki til at endurvinna sítt lívsbreyð, sigur Anders Ladekarl.

Hann kom herfyri aftur úr jarðskjálvtarakta økinum, og hevur tí við egnum eygum sæð tørvin á hjálpa og eisini, hvussu hjálpararbeiðið er komið í gongd.

Tað hevur eydnast at fáa læknar og sjúkrasystrar inn í økið. Soleiðis hevur ein tryggjað sær, at sjúkrahúsini kunnu fremja skurðviðgerðir og annars røkta tey mongu sum eru komin til skaða.

Reyði Krossur í Danmark hevur higartil savnað inn omanfyri 250.000 kr., eins og felagsskapurin hevur játtað 200.000 kr. úr kreppugrunni sínum til sama endamál. Uttanríkisráðið og danska sendistovan í Indonesien hava latið 4,6 mió. kr.



– Hjálpin úr Føroyum ger góðan mun í jarðskjálvtarakta økinum, sigur Suni Vinther, formaður í Reyða Krossi Føroya

**FAKTA**

**Jarðskjálvtin:** Rakti tætt við stórbýin Yogyarkarta leygardagin 27. mai, og varð máldur til 6,3 á Richtertalvuni.
**Skaðar/deyð:** Higartil rokna indonesisku myndugleikarnir við at um 5000 fólk eru deyð og omanfyri 130.000 heim løgd í oyði
**Landið:** Í Indonesien eru omanfyri 13.700 oyggjar í Kyrrahavinum.
**Íbúgvarar:** 230 milliónir
**Høvuðsstaður:** Jakarta

# Gott at búgva í Sørvági

**– At inntøkan av skatti hækkar, setir samstundis krøv til okkum um at brúka peningin á skilagóðan hátt, sigur borgarstjórin í Sørvági, Jákup Suni Lauritsen**

FÍGGJARSTØÐA

*Snorri Brend*

**Sørvágur:** – Vit kunnu bert gleðast um, at fleiri og fleiri vilja búseta her í Sørvági, sigur Jákup Suni.

Hesa seinastu tíðini hava tey í kommununi sæð gongdina, at fólk flyta vestur, men vilja framvegis varðveita arbeiðið sítt á øðrum støðum.

Hetta hevur aftur skapt tørv á enn fleiri grundøkjum. Ein útstykking er í løtuni í gerð, men henda nøktar als ikki tørvin.

– Vit mugu tí í holt við at stykkja út fyri enn fleiri grundøkjum. Hesi verða tøk fyrst í komandi ár, sigur ein væl nøgdur borgarstjóri.

### Trívast

Fíggjarstøðan hjá kommununi er somuleiðis avbera góð. Roknskapurin fyri farna árið javnvigar við 80 mió. kr.

Roknskapurin vísir, at í fjør vórðu gjørdar fyri oman fyri 10 mió. kr. í íløgum, harav barnagarð

Positiva gongdin hjá kommununi heldur fram í ár. Staðfestast kann nevniliga, at skattainntøkan heldur fram at hækka.

Nógv virksemi er eisini í kommununi. Ein nýggjur barnagarður verður liðugur í august mánaði, eitt nýtt reinsiverk verður liðugt um stutta tíð, eins og aðrar ætlanir eru í gerð beint nú.

– Hetta eigur alt at gera sítt til at kommunan veksur og at fólk fara at trívast her, sigur Jákup Suni.



Sørvágur stendur í menning, og hetta sæst aftur í fíggjarstøðu og eftirspurninginum á grundøkjum